VÍF–Neistin 25–21 (13–12)

# Tungt hjá VÍF

**Tá dysturin var lokin, var tað als ikki sigurin, sum vestmannagenturnar hugsaðu um. Tankarnir vóru heldur hjá Nicoletu Radu, sum noyddist av vøllinum við brotnum beini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast VÍF uttan iva vóru favorittar at vinna dystin móti neistakvinnum mikukvøldið, so gjørdist hetta alt annað enn lætt hjá oddaliðnum. So at siga allan dysitn hevði Neistin gott tak á oddaliðnum, men serliga var tað ein einstøk hending, sum gjørdi sítt til, at oddaliðið ikki fekk glið á sítt spæl.

Nicoletta Radu, sum í ár hevur verið VÍF ein hollur stuðul, breyt beinið í einum hendiligum óhappi, og hetta setti so avgjørt sín dám á dystin fyri heimaliðið.

## Hendiligt óhapp

Hjørleif Kúrberg, ið er annar av venjarunum hjá VÍF, sigur við Sosialin, at eftir tað sum hendi, eru tær fegnar um, at tyær yvirhøvur vunnu dystin.

– Hendingin setti so avgjørt sín dám á spælið. Fleiri av spælarunum tóktust skelkaðar um tilburðin, og tað sá eisini rættiliga ógvusligt út, tá Nicoleta fekk skaðan.

– Eg havi tosað við hana um, hvat tað var sum hendi, tá skaðin kom. Hon segði seg royna at bróta ígjøgnum neistaverjuna, og tær fóru einar tvær ella tríggjar upp. Onkursvegna lendi ein av neistakvinnunum á beininum hjá Nicoletu, tá hon royndi at fara, og úrslitið var, at sjálvur øklaknúturin er brotin.

Hjørleif leggur annars afturat, at talan so avgjørt ikki var um nakra tilætlaða ger móti sterka rumenanum, men at talan var um eitt hendiligt óhapp. Eitt óhapp, sum kann vísa seg at gerast ein stórur missur hjá VÍF.

– Hetta er sjálvandi ein stórur missur hjá okkum. Nicoleta er ein rættiligur all-round spælari, og ikki minst í verjuni er hon ein týdningarmikil partur av lionum, sigur Hjørleif.

## Verður tungt

Annars heldur venjarin, at talan ongantíð var um nakran lættan dyst hjá VÍF mikukvøldið.

– Eg haldi at Neistin spældi bæði væl og skilagott, og tær høvdu eitt rættiliga gott tak á okkum. Manuela fekk heldur ikki gjørt tað stóra í málinum, og eftir óhappið hjá Nicoletu haldi eg ikki, at hon nart við nakað sum helst. Hallfríð Isaksen kom so í málið ístaðin, og eg hon átti so avgjørt sín stóra lut í, at vit komu heilskapaðar ígjøgnum dystin. Eisini sjálvt um úrslitið at enda als ikki var tað, sum var fremst í hugaheimi okkara.

– Sjálvandi átti Ioana Rápa eisini sín part. Hon skjýtur jú 11 av málunum hjá okkum, sigur Hjørleif um sjálvan dystin.

At Hjørleif hevur rætt í, at missurin av Nicoletu verður svárur, er einki at ivast í. Eftir eina heldur tama byrjan, hevur nýggi rumenin fingið ein alt meira týðandi leiklut á liðnum. Ikki minst hevur hetta verið sjónligt í dystunum móti hinum oddaliðunum, eins og hon í steypafinaluni var ein av absoluttu profilunum á VÍF liðnum.

Ilt er at siga, hvar VÍF skal fáa fólk inn fyri hana, tí er nakar veikleiki á VÍF liðnum, so er tað helst manglandi breiddin í hópinum. Nakrar eru tó á næst besta liðnum, sum áður hava spælt nógv við í fremstu deildini, og ivaleyst verður tað so, at onkur av hesum nú verður tikin við í hópin.

So er bara at vóna hjá vestmenningum, at hetta verður nóg mikið til at tryggja teimum FM-gullið. Tær hava í løtuni nakað at geva av, áðrenn næstu liðini fáa fatur á teimum, men hinvegin er skjótt, at fjáltur kann koma á.

Áður hava kvinnurnar tó sýnt, at tær eru gjørdar úr heilt serligum tilfari, og komandi vikurnar hava tær meira enn nakran tíð fyri neyðini at prógva, at so er.




*Nicoleta Radu breyt beinið í dystinum móti Neistanum, og einki er at ivast í, at hetta er ein svárur missur hjá VÍF*
*Savnsmynd*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ioana Rápa 11(2), Sóley Mikkelsen 4(1), Fríða Marjunardóttir 2, Alis Høghamar 2, Nicoleta Radu 2, Manuela Stan 1, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 1, Randi Kúrberg 1, Jacklin Durhuus 1
Neistin: Katrin á Neystabø 5, Súna Mørk 5, Annika Thomsen 4(1), Mildrid Jacobsen 3, Birita Wardum 2, Bjørg Patursson 1(1), Susan Brockie 1
Brotskøst: VÍF 3, Neistin 2
Útvísingar: VÍF 4, Neistin 5
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

# FM verður í Vestmanna

**Føroyameistaraskapurin fyri einstaklingar verður telvað um páskirnar í Vestmanna. Vestmanna Talvfelag verður 50 ár í ár, og skipa tískil fyri stórsligari FM kapping**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Vestmanna Talvfelag varð stovnað 1. apríl 1951. Fyrsti formaður felagsins var Magnus Petersen, vanliga nevndur doktarin. Stórur áhugi var fyri talvi í bygdini, og á stovnandi aðalfundi vóru frægir menn til staðar, eitt nú Hans Petersen, Olaf Durhuus og Samson Højgaard.

Felagið hevði ikki egin hølir, men telvað varð av fyrstan tíð í gamla skúlanum. Skjótt mentist teir sum telvarar, og longu í 1954 vunnu teir tiltikna Wood-borðið í harða kapping við havnarliðið, og síðani eru fjúrtan meistaraheiti follin til vestmenningar, ellivu í Wood-kappingini, og trý í FM liðkappingini. Tað seinasta varð í 1992.

Í 50´unum og 60´unum mundi VT helst vera sterkasta felag í landinum.

Vestmenningar eiga tríggir føroyameistarar; Hans Petersen í 1972, John Jacobsen í 1978 og John Rødgaard í 1998. Mest tiltiknu talvfamiljurnar í Vestmanna mugu vera Durhuus- og Højgaard familjurnar

### Eitt virkið felag

Verulig gongd er komin í felagslívið aftur í VT, har nógvir møta til talvkvøldini, ung sum gomul, og eisini eru teir vælmannaðir í liðkappingini við trimum liðum.

Málsetningur teirra í ár er at endurvinna FM-heitið frá 1992, og at hjálpa teimum í ár hava teir fingið Torbjørn Thomsen við á liðið og eru teir sostatt sera vælmannaðir við John Rødgaard, sum í nógv ár hevur telvað við liðnum og Torbjørn á fremru borðunum. Tað verður tó tungt hjá teimum at náa hesum máli, men enn hava teir møguleikan.

Felagið heldur til í dag í hølunum hjá Vestmanna Arbeiðarafelag, og hevur hetta roynst væl.

Formaður felagsins er Jón Mikkelsen, kassameistari er John Jacobsen, meðan Kári Durhuus, Jákup Á. R. Andreasen og Hanus S. Jóanesarson eru nevndarlimir.

### Krútsterkur landsliðsbólkur

Hesi seinastu árini er landsliðsbólkurin verið mannaður av nærum øllum topp tíggju telvarnum, og í ár verður helst einki undantak. Teir sum longu hava játtað eru John Rødgaard, Ólavur Simonsen, Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Rani Nolsøe og ungi Martin Poulsen, sum í fjør tryggjaði sær luttøku í landsliðsbólkinum við at vinna fyrsta bólk, men sum eisini hevur ratingina til tess.

Føroyameistarin frá í fjør, Flóvin Tór Næs hevur givið avboð. Síðani er ivamál um John Arna Nilssen og Torbjørn Thomsen, men vestmenningar arbeiða hart fyri at fáa hesar sterku menn við í hópin.

Teir sum ikki fara at røkka einum plássi í ovasta bólki, telva í opnum almennum bólki, eins og í fjør. Unglingabólkur verður sjálvsagt, og serligur veteranbólkur verður afturvendandi, har hesar gomlu kjempur fara at telva seks stutt talv yvir tríggjar dagar.

Alt í alt sera áhugavert, og spurningurin er um vestmenningar megna at samla sterkasta landsliðsbólk nakrantíð. Sum skilst vera sera góðar virðislønir lætnar í ár.

### Tilmelding

Telvað verður í døgunum 7 — 14. apríl í Vestmanna skúla. Tó telva veteranarnar bert 12 — 14. apríl.

Seinasta freist at boða frá luttøku er 4. apríl. Tilmelding fer fram at flyta luttøkugjaldið á konto 4926112 í Føroya Sparikassa ella konto 4317698 í Føroya Banka. Luttøkugjaldið er 350 kr. í landsliðs- og almenna bólkinum, og 200 kr. fyri unglingar og veteranar.

Eisini fer at bera til at tekna seg á www.faroechess.com



LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Leiðari til maskindeildina

Starvið sum leiðari av maskindeildina hjá stovninum verður lýst leyst av nýggjum.

Maskindeildin hevur um hendi maskinamboð, skerv- og asfaltútbúnað, akfør o.a. hjá stovninum, umframt viðlíkahald av asfaltgoymsluna í Hósvík. Amboðini eru í nýtslu kring landið - mest í sambandi við gerð og hald av landsvegum. Maskinmiðstøð er í Kollafirði og annars smiðja á Lambareiði, í Øravík og Hvannasundi. Eini 25 fólk tilsamans eru knýtt til hetta virksemið. Smiðjumeistarar hava dagliga raksturin um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Viðkomandi hevur samskipanina av smiðjunum um hendi og hevur ábyrgdina av hesum virksemi.

Í høvuðsheitum er uppgávan hjá deildini rakstur av smiðjunum, viðlíkahald av maskinamboðum og útbúnaði, eykalutagoymsla, innkeyp av amboðum, eykalutum o. øðr.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir maskinverkfrøðingi ella maskinmeistara og helst við royndum innan nevnda virkisøkið.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. mars 2001. Merkið brævbjálvan »Leiðari til maskindeildina«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Óla M. Petersen, deildarverkfr., á tlf. 3113 33
(e-postur: oli@lv.fo ella lv@lv.fo ) .

## Parkinsonfelagið

Aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum 24. februar 2001. Skrá samb. lógum felagsins.

**Nevndin**

Havnar SJÚKRAKASSI

## Limagjaldið fyri 2001

Limagjaldið fyri A- og B-limir er kr. 180,- fyri mánaðin í 2001.

**Havnar Sjúkrakassi**

## Rúsevnismisnýtsla millum ungdómin

**Týskvøldið 27. febr. kl. 19.30–21.00**

verður almennur fundur í fimleikahøllini í Fuglafjarðar skúla.

Pól Jákup Thomsen frá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum og løgreglan kunna um nýtslu og misnýtslu av rúsevnum millum ungdómin.

Tiltakið er serliga ætlað foreldrum, men annars eru øll vælkomin!

**Fuglafjarðar skúli**

**Starvsmannafelagið**
**40 ár**

## Móttøka

verður í felagshølunum
**fríggjadagin 23. februar**
**frá kl. 14.00 til 17.00.**

**Starvsmannafelagið**

## Árliga »Giljanestiltakið«

**sunnudagin 25. februar.**

Tað árliga Lions tiltakið verður sum vant aftur í ár.

Mattombola, loppumarknaður, fiskibrunnur, tombola, 21-spæl, skjóting, tunnusláing, bóltspark o.a.

Eydnuhjól við nógvum góðum vinningum, eisini heimagjørdir lutir.

Eivør Pállsdóttir syngur og »Upp og Tá« sýnir fram dansir.

Møguleiki er at keypa fr. hogdogs og pizza.

Lutaseðlarnir verða drignir kl. 23.00.

**Tiltakið byrjar kl. 16.00.**

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lions Club Vágar**

Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt

Frá CAFÉ NATÚR

## Nú selja vit ALT út úr húsinum t.d.

- Cafédrykkir og súpan í termokrússum
- Bakað epli o.a. heitir rættir
- Sandwich o.m.a.

## Broyttur matarseðil

Nógv nýtt leskiligt er komið á matarseðilin, t.d. av víni og cafédrykkum. Nógv nýggj sløg av sandwich.

NÝTT

Royn eisini okkara nýggju heimagjørdu lasagnu!

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
**Tlf. 31 26 25**

Oljumálastýrið

## Journalførari til Oljumálastýrið

Í sambandi við barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir avloysara fyri journalførara í Oljumálastýrium. Starvið verður at seta 15. mars 2001 og er tíðaravmarkað til 1. apríl 2002.

Arbeiðið fevnir um journalisering í Doculive journalskipanini umframt at taka lut í dagliga arbeiðinum í Oljumálastýrinum eitt nú at avloysa í bókhaldinum og í móttøkuni.

Fyrimun hava tey, ið hava royndir og áhuga fyri journalisering og bókhaldi, umframt at duga væl føroyskt og enskt í skrift og talu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum lønardeildina hjá Fíggjarmálastýrinum og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tinu Johannesen, Oljumálstýrið, telefon 357070, telefax 357075 og teldupost tinaj@oms.fo

Umsóknir, saman við avriti av prógvi og frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Oljumálastýrinum, Postboks 3059, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2001.

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192